# Jól hjá Kuffunum

**Dramabólkurin í KFUM & KFUK í Klaksvík er sera virkin fyri tíðina. Fyri góðum 3 vikum síðani framførdu tey ein bíbliuleik í sunnudagsskúlanum, og nú hava tey fyrireikað seg til jóla**

TÍÐINDASKRIV
*KFUM og K*



Í hesum sambandinum bjóðar dramabólkurin til opið hús og jólahugna í KFUM & KFUK í Klaksvík, hóskvøldið 16. des. kl 19.00 og fríggjakvøldið 17. des. kl 22.30.

Dramabólkurin hevur vant jólaevangeliið, ið er klætt í nýggja búna. Tvey børn sita og droyma um, hvussu tað hevði gingið fyri seg, um Jesus bleiv føddur í 2004. Tað er øðrvísið og hugvekjandi, siga tey, so nú er bara at koma at hyggja.

Tiltakið er ætlað til alla familjuna, og tað er sjálvandi ókeypis. Á skránni verða jólasangir, drama, prát og hugni, saman við jólasøgu.

Tiltakið fríggjakvøldið er eisini fyri alla familjuna, men er lagt kl 22.30, fyri serliga at royna at fanga ungdómin.

Dramabólkurin framførir eisini í Havn, og verður hetta til stóru jólakonsertina á Hálsi leygarkvøldið. Meira fæst at vita, við at vitja www.kuff.fo

## Negativ tilflyting

Hagtøl hjá Hagstovu Føroya vísa, at vend er við at koma í nettoflytingina til og úr Føroyum. Í 2004 hevur flytimynstrið yvirhøvur verið merkt av, at tilflytingin minkar, meðan fráflytingin veksur. Størsta tilflytingin var í 1998, tá 1.985 fólk fluttu til Føroya, meðan fráflytingin var minst í 2001, tá 1.208 fólk fluttu hiðani. Síðani 2001 er nettoflytingin støðugt minkað, og fyrstu 10 mánaðirnar í ár vóru fráflytararnir 138 fleiri enn tilflytararnir, og nettoflytingin var sostatt negativ. Vanliga er tilflytingin størri enn fráflytingin í november og desember, men seinastu 4 árini er munurin støðugt minkaður. Verður henda gongdin tann sama í ár, er líkt til, at nettoflytingin fyri alt árið verður negativ. Um hetta hendir, verður 2004 tað fyrsta árið síðani 1995, har fráflytingin er størri enn tilflytingin.

-tn

## Færri sand- og suðuroyingar

Hagtøl, sum Hagstova Føroya hevur savnað, vísa nú, at fólkatalið minkar sunnan fyri Skopunarfjørð. Hinvegin vísa tølini, at fólkatalið í Streymoynni og í Vágum er vaksandi, meðan tað í Eysturoynni og í Norðoyggjum stendur í stað.

Burðartøl vísa eisini, at bæði í Sandoynni og í Suðuroynni verða lutfalsliga væl færri børn fødd enn í restini av landinum.

Henda gongd við at fólkatalið er minkandi í Suðuroynni og Sandoynni er nakað, ið vit kenna aftur frá kreppuni í nítiárunum.

-tn

## Færri sáttmálar

Væntandi verða væl færri lærlingasáttmálar innan handverksvinnuna í ár í mun til undanfarin ár. 30. november í ár eru 149 lærusáttmálar undirskrivaðir. Til samanberingar vóru í 2003 gjørdir 196 lærusáttmálar. Væntast kann ein lækking á eini 25%.

Hetta má sigast at vera nógv, serliga tá ið hugsað verður um, at talið er lækkað fleiri ár á rað.

Tað er serliga innan masksmíð, at færri lærlingasáttmálar eru gjørdir. Í 2003 vóru 43 nýggir lærlingasáttmálar gjørdir, meðan talið tann 30. november 2004 var 23. Støðan í alivinnuni hevur uttan ivað gjørt støðuna trupla hjá smiðjunum, samstundis sum búskaparstøðan sum heild er versnað. Útlitini fyri framtíðina hava uttan ivað ávirkað tilgongdina soleiðis, at virki og meistarar atra seg við at seta lærlingar. Men endurgjaldið til meistarar og virki, tá ið lærlingur er í skúla, hevur mest sannlíkt eisini ávirkað gongdina skeiva vegin. Endurgjaldið lækkaði úr 100% niður í 75%, samstundis sum umrøtt hevur verið at lækka gjaldið enn meira. At gjaldið fer upp og niður, er ikki serliga tryggjandi og er ikki við til at skapa eina javna gongd, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu sínari

-tn

## Savna vinnusøgu

Landsskjalasavnið er farið undir eina verkætlan sum skal tryggja, at søguligt tilfar um føroyskt vinnulív ikki verður burtur.

Sum heild er alt ov lítið vinnusøguligt tilfar savnað og skrásett í Føroyum. Vandi er fyri, at søguliga sera áhugaverd vinnuskjøl, sum eru í privatari varðveitslu, verða burturbeind ella farast av elli. Verða tey ikki varðveitt, fer ein týðandi mentanarsøguligur táttur, søgan um privatan virkishug, vinnulív og arbeiðslív, at gleppa okkum úr hondunum.

Føroya Landsskjalasavn er, saman við Borgarskjalasavninum í Reykjavík og Landsskjalasavninum í Grønlandi, farið undir eina verkætlan, nevnd "fíha". Heitið er ein stytting av orðunum "fiskivinna", "ídnaður", "handil" og "arbeiði". Verkætlanin er stuðlað av Nordisk Kulturfond og Mentamálaráðnum.

Ætlanin er at staðfesta, varðveita og skráseta alt skjalatilfar viðvíkjandi fiskivinnu, ídnaði, handli og arbeiði, sum er í privatari varðveitslu. Endamálið við verkætlanini er at tryggja, at hesin týdningarmikli parturin av føroyska mentunararvinum ikki verður burtur.

-tn




Heðin Klein:

# Móti tøgnini

**Mentunargrunnur Studentafelagsins gevur út »Móti Tøgnini« hjá Heðini Klein, sum er egnar yrkingar og týðingar eftir Olav H. Hauge**

ÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Heðin Klein hevur nú givið út sítt fimta yrkingasavn, har fyrra helvtin er egnar yrkingar, meðan tann seinna er týðingar eftir gitna norska modernistin Olav H. Hauge (1908-1994). Egnu yrkingar høvundans eru pointeraðar lívsroyndir blandaðar upp við speisom prik til bæði Tórodd Poulsen og háfjallsólmentanina. Ein kensla av at vera innilæstur eyðkennir fleiri tekstir, og hon verður lýst við samansjóðaðum orðum. Somuleiðis er íblástur javnan frá málningalist, og eitt ekkó av Janusi Djurhuus varnast viðhvørt.

Olav H. Hauge fær størri og størri týdning í norðurlendskum skaldskapi, og tað er eitt lítið bragd at fáa hann í ein føroyskan ham. Stílurin er í høvuðsheitum stuttorðaður, og tað er greidligur íblástur fra haiku-yrking. Eitt slag av poetiskari minimalismu.

»Móti tøgnini« er løgd til rættis og prentað á Hestprent. Hon er 98 síður til longdar og kostar kr. 140. Bárður Jákupsson gjørdi permuna Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út.

merko JÓLAKALENDARIN

*Hósdagur 16. desember 2004*

*DANISH CROWN kotilettir 4x100 gram*



*tak 4 pakkar fyri 99⁰⁰*

*SUPER ertur og gularøtur 1 kilo*



*9⁹⁵*

*Royktur norskur laksur 200 gram*



*19⁹⁵*



SPURNINGUR

Hvør hevur týtt jólasálmin: "Eg gleðist so hvørt jólakvøld" ?

Tilboðið er bert galdandi hósdagin 16. desember.

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald.
Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum

SVAR

NAVN & TELEFON NUMMAR